


# HEVUR TÚ HUG AT GERAST STARVSLESANDI



**Kanska verður tú tann næsti starvslesandi á einum av føroysku sendistovunum ella í Føroyum í einum av stjórnarráðunum?**

Í starvslestrinum fært tú innlit í politisku skipanina og hvussu almenna fyrisitingin virkar. Tú kanst eisini fáa kunnleika um ávíst málsøki í sambandi við lestraruppgávu. Ljóðar hetta áhugavert, kanst tú søkja um at sleppa í starvsvenjing á Løgmansskrivstovuni ella í einum av stjórnarráðunum í eitt lestrarhálvár.

Stundar hugur tín longri út í heim, kanst tú eisini gerast starvslesandi á sendistovum Føroya í Brússel, Keypmannahavn, London ella Reykjavík.

Fyri at søkja skalt tú lesa á lærdum háskúla og tað er ein fyrimunur at hava lokið grundútbúgving á bachelorstigi. Starvslesturin kann, um tín útbúgvingarstovnur góðtekur tað, eisini gerast partur av útbúgving tíni.

Les meira á www.tinganes.fo undir Størv.

Umsóknarfreistirnar eru
1. apríl (fyri seinna lestrarhálvár) og
1. oktober (fyri fyrra lestrarhálvár).

sansir.fo

Løgmansskrivstovan tænir løgmanni í at stjórna landsstýrinum og hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja uppgávurnar, sum løgmaður hevur samsvarandi stýrisskipanini, nevniliga at samskipa og hava eftirlit við landsstýrinum, harumframt fyrisiting og uttanríkismál.

VIT DRAGA EINA LÍNU · VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI · VIT VILJA VITA · VIT BRÓTA SLÓÐ

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office




**Við hesum verður arbeiðið at gera vinnustykkir við Karlamagnusarbreyt í Tórshavn boðið út í almennari lisitatión.**

Arbeiðið verður útboðið í høvuðsarbeiðstøku og fevnir um planering av grundøkjum og parkeringsplássum, gerð av síðuvegum og íbindingum og neyðugar reguleringar av kloakkum og øðrum installatiónum fram við Karlamagnusarbreyt, frá Kirkjustræti og niðan til Rólantsgøtu. Arbeiðið verður lutað í tvær arbeiðstøkur á uml. 300 metrar hvør.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast frá:

Tórshavnar kommunu
Snarskivan
Vaglið
FO-100 Tórshavn
Telefon +298 302010

í seinasta lagi mikudagin 19. september 2007 og verður útflýggjað mánadagin 24. september móti einum veðhaldi á 5.000,00 kr, ið skal flytast á konto 9181-200 368 8 í Eik Banka ella 6460-220 342 3 í Føroya Banka.

20% av veðhaldinum verða afturgoldin, um útbjóðingartilfarið er latið Snarskivuni aftur í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina í sama standi, sum tað varð útflýggjað.

Lisitatiónin verður á Byggideildini hjá Tórshavnar kommunu, mikudagin 10. oktober 2007 kl. 14.00.

Ástaðarfundur verður fríggjadagin 28. september 2007, kl. 10.00.

REPROZ

Tórshavnar kommuna